

Gassframleiðsla í Kenai í Alaska. Í løgur í Alaska og Kanada eru millum tær dýrastu. Mynd: ConocoPhillips

# Oljuíløgur fyri 700 milliardir krónur lagdar í skuffuna

**Jógvan Hugo Gardar**

23.05.2015 - 14:31

Oljan.fo

Fallið í oljuprísinum rakar nú við fullari ferð íløgupostarnar hjá oljufeløgunum. Sambært yvirlitum sum eru almannakunngjørd í vikuni, so eru ætlanir fyri eini 700 milliardir krónur antin steðgaðar, ella útsettar, sambært Financial Times.

Sambært blaðnum hava Shell, BP, ConocoPhillips og Statoil avgjørt at útseta ella at gera broytingar í 26 størri ætlanir í 13 londum.

Hesar sparingarnar raka nógv túsund arbeiðspláss í oljuídnaðinum. Oljufeløgini hava longu gjørt broytingar í nøkrum av teimum dýrastu ætlanunum, harímillum finnast níggju oljusandætlanir í Kanada, ið allar longu eru seinkaðar.

Hetta eru ætlanir sum hava ein kostnað uppá millum sjey og 70 milliardir krónur. Sambært Rystad Energy, ið hevur gjørt kanningararbeiði fyri Financial Times, so er talan um í hesum førinum at útreiðlur fyri mer enn 800 milliardir krónur verða raktar av sparingunum, men talan er í hesum førinum um sparingar sum raka ídnaðin tey næstu árini.

Seinkingarnar í hesum ætlanunum fara at merkja at 1,5 milliónir føt av olju um dagin ikki fara at koma á marknaðin. Kanningin hjá Rystad byggir á oljuætlanir sum eru minst 50 milliónir føt av oljulíkum til støddar.

Greinararnir hjá Goldman Sachs hava eisini funnið 61 aðrar ætlanir sum ikki løna seg um prísurin er 60 dollarar ella lægri fyri fatið av olju. Í hesum førinum er talan um at íløgur fyri einar fimm milliardir krónur eru í vandsa fyri at detta niðurfyri.